


www.oljan.fo

**Jan Müller** 13 - 09 - 2011

# Aftur úrslitaleyst hjá Cairn

Skotska oljufelagið Cairn Energy kunnger nú, at boriskipið Ocean Rig Corcovado er givið at bora á djúpum vatni á Eqqua-økinum úti fyri Aasiaat í Vesturgrønlandi, og at hvørki olja ella gass var at finna har. Longri vesturi er pallurin Leiv Eiriksson í ferð við at bora á Napariaq-leiðini, og tá hann er komin niður á ta ásetta dýpið, fara báðir pallarnir suðureftir, har teir skulu bora hvør sítt hol úti fyri Nuuk. Higartil er Leiv Eiriksson bara komin fram á onkur smávegis tekin um kolvetni, verður sagt. Skotska felagið roknaði við at brúka góðar tríggjar milliardir krónur til boringar í Grønlandi í ár. Hóast leitingin ikki hevur givið nakað úrslit enn, hevur felagið ikki mist vónina um at finna olju í Grønlandi, sigur stjórin, Simon Thomsen, sambært Ritzau-tíðindastovuni.